Jóansøku og biladekkið var pinnpakkað. Yvirhøvur fóru fólk at ferðast nógv meiri enn fyrr, nú møguleikarnir at ferðast batnaðu so munandi.

Smyril, sum varð bygdur í Havn, var eitt sera gott sjóskip og tað var so sterkt smíðað sum eg veit ikki hvat.

Smyril, sum nú fer í søguna, hevur eisini verið eitt sera gott sjóskip, hóast mong vóru sannførd um, at hann fór at koppa, tí hann var flatbotnaður og tað vóru vit ikki von við.

Hann kom til Føroya mitt í útróðrarverkfallinum í 1975, tá ið onkrar havnir vóru avbyrgdar.

Tá ið hann skuldi leggja at á Tvøroyri, legði ein bátur seg ímillum bryggjuna og skipið. Men skiparin gav greið boð um, at nú legði hann at og tá ið maðurin á lítla bátinum sá dýrið nærkast, mátti hann bara taka til rýmingar.

– Hesin Smyril fór eisini at sigla ímillum lond, bæði til Noregs og Íslands, men eisini til Skotlands og Danmarkar. Somuleiðis varð Teistin keyptur, so at annað skipið sigldi innanlands og hitt uttanlands.

Tað var eitt hart lív, tí frítíðin var lítil og svøvnurin lítil. Um summarið var altíð heilt nógv fólk við, men um veturin var fittligari, tí tá var ikki so nógv fólk við.

– Men hendan uttanlandssiglingin var eitt tiltak, sum ferðafólk vóru ómetaliga glað fyri, tí hetta gav føroyingum heilt aðrar møguleikar at ferðast enn vit vóru von við. Tað kundi vera ódnarveður, men kortini takkaðu ferðafólk so mirðiliga fyri túrin.

– Tað var mangan ringt veður og hann kundi rulla ótrúliga illa.

– Tað einasta góða við tí, at veðrið var vánaligt, var, at tá hevði kokkurin lítið at gera, tí umframt manningina, vóru taðfá, sum troystaðu sær at eta.

Kortini broyttist hann rættiliga nógv til tað betra, tá ið hann fekk stabilisatorar. Og nú kunnu tað ikki vera tvær meiningar um, at hann hevur verið okkum eitt ómetaliga gott skip.

Men serliga gott heldur Kári, at maskinfólkið við Smyrli hevur verið.

– Uttan so gott maskinfólk, hevði tað aldrin borið til. Tá ið hann var á donskum hondum og sigldi í Danmark, stóð altíð ein riðil av maskinfólki til reiðar at fara umborð at arbeiða um næturnar. Tað hevur ikki verið ímeðan hann hevur siglt við Strandferðsluni, tí maskinfólkið hevur sjálvt gjørt tað, sum var neyðugt at gera. Sýnismenn, sum hava verið umborð fyri Skipasýn og klassa, hava eisini havt á munni, hvussu vælhildið maskinrúmið er.

Ringasti túrur ímillum Havnina og Suðuroynna við Smyrli, sum nú gevst, tók einar seks tímar.

– Tað var ein fúlur túrur, Ein danskur lækni, sum var við, skrivaði grein um tað bløðunum aftaná. Einaferð Dúgvan sigldi fyri Smyril, steðgaði hon upp í Suðuroyarfirði og rak fyri vág og vind í fleiri tímar. Og tað vildi ikki mætari til enn at sami lækni var aftur umborð tá, so hann hevur ikki góð minnir um suðuroyarsiglingina.

Nú fáa vit so nýggjan Smyril og Kári ætlar sær heilt víst yvir á samferðsluhavnina, tá ið hann kemur nú leygardagin.

– Tað trongdi harðliga til at fáa nýggjan Smyril, tí hin var uppslitin.

Men alt hetta við at sigla fleiri túrar, veit hann ikki rættiliga

– Tá ið mann fer til Havnar, fer mann fyri dagin, sigur hann.

Tí heldur hann, at vit skulu halda fram við tveimum túrum um dagin og so kann ferðaætlanin endurskoðast aftur ímóti sumri.


*Smyril hevur mangan ódnartúrin havt ímillum Suðuroy og Havnina. Her er hann á veg út av Trongisvágsfirði ein illveðursdag*

## Bundu rokkararnar niður

Annars heldur hann, at ferðafólkið yirhøvur hevur verið ógvuliga fitt at hava við at gera.

Kortini vóru undantøk, sum ta ferðina, teir sigldu úr Noregi til Danmarkar og eitt harkalið av rokkarum úr Noregi vóru við. Teir gjørdu nógv um seg umborð, slógu um seg við ketum og vóru til stóran ampa.

– Men teir vóru ikki verri enn so enn at manningin fekk tikið teir og bundið teir niður, allar samlar. Nakrir vórðu lokkaðir inn í messuna ein og ein at fáa sær breyð og so vórðu teir tiknir og bundnir og at enda lógu allir í bondum. Løgreglan kom so eftir teimum og motorsúklunum og alt varð koyrt íland.

Rokkararnir vóru ørir og lovaðu hevnd, men ongin sá nakað aftur til teir.

Eisini eina aðruferð komu ófriðarkroppar umborð, men eisini teir vórðu tiknir og stongdir inni í storesrúminum til komið varð í havn og løgreglan kundi fara avstað við teimum.

Viðhvørt kundi eisini misskiljingar føra til ymsar merkiligar støður. Einaferð lógu bæði Teistin og Smyril á Tvøroyri. Annars skuldi til Skotlands og annar til Havnar.

– Tá ið skotlandsbáturin loysti, kom ein ferðamaður algoystur við bili oman á ferjuleguna og sá bátin fara útfrá. Hann var argur tí hann var afturútsigldur og stillaði seg at rópa "reyvarhol" eftir manningini. Onkur spurdi hann so, hvagar hann skuldi.

Jú, hann skuldi til Havnar

Ja, men so var tað ikki báturin, sum júst hevði loyst. Báturin, sum skuldi til Havnar, var ikki farin enn. So ferðamaðurin var fegin, tá ið hann fór umborð, men samstundis ógvuliga forharmaður, at hann skuldi havt rópt soleiðis eftir hinum.

Kári Thomasen hevur verið avbera vælnøgdur við árini umborð á strandfaraskipunum.

– Manningin hevur verið avbera fitt og vit hava verið sum ein stór familja og vit hava eisini havt avbera fittar skiparar, so haðani havi eg bara góð minnir, sigur tann gamli kokkurin.


*Eisini í uttanlandssigling var mangan hart. Hesa myndina tók ein skoti av Smyrli á veg út úr Aberdeen. Stutt eftir fekk hann stibilisatorar*

